*»Eftir eina slíka uppliving gongur tú jú støðugt og hugsar, hvat tað er, sum gongur fyri seg í høvdunum hjá slíkum fólki«*
*Alex José Dos Santos, B36*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



# Tað hendir næstan hvønn dyst

**Alex José Dos Santos hjá B36 sigur seg hava fingið nokk. Mikukvøldið á Eiði var serliga ringt, men at kalla hvønn dyst sigur hann, at racisman sleppur at blóma á vøllinum**



*– Eg eri langt ífrá einasti spælarin, sum upplivur hesar trupulleikar. Tvørtur ímóti, so er hetta nakað, sum allir littir spælarar í landinum kennast við, sigur Alex José Dos Santos*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Sjálvandi eru provokatiónir ein partur av spælinum. Tað er einki óvanligt í, at spælarar illneitast á hvønn annan, men aloftast er hetta gloymt, tá dysturin er farin. Fyri mítt viðkomandi vil eg siga, at dysturin á Eiði í gjár var nógv verri enn vanligt. Men tá tú støðugt upplivir primitiva racismu á vøllinum, fært tú nokk fyrr ella seinni. Og eg havi fingið nokk.

### Stórtrívist í Føroyum

Alex José Dos Santos leggur ikki fingrarnar ímillum. Seinastu trý árini hevur vinstrabeinti brasiliumaðurin verið ein av avgjørdu favorittunum hjá B36-viðhaldsfólkunum. Trygt verjuspæl saman við drønandi raidum niðan eftir síðulinjuni seta hann langt upp á listan, tá besti bakkurin í landinum skal finnast, og hann sigur seg eisini stórtrívast í havnarfelagnum.

- Eg havi tað gott við bæði fótbóltinum og í tilveruni annars. Fyri stuttum eri eg byrjaður í starvi á nýggja ítróttarfrítíðarskúlanum, og eg stórtrívist við hesum.

### Racisman oyðileggur nógv

Men hann hevur ein stóran trupulleika, tá spælt verður. Stútt og støðugt er hann offur fyri racistiskum viðmerkingum, og hann leggur dent á, at hann langt ífrá er einasti spælarin í so máta.

- Tað er ein trupulleiki, sum allir littir spælarar her á landi hava. Fyri mítt viðkomandi var dysturin í gjár dropin í so máta, og hetta kann ikki standa ósvarað, sigur hann.

- Eg veit væl, at endamálið er, at eg skal missa tamarhaldið á mær sjálvum, og tað er eisini nær við viðhvørt. Sum oftast klári eg tó at halda fokus á spælinum. Ikki minst tí liðfelagarnir í nógvar mátar eru fantastiskir stuðlar. Men tað er sera hart persónliga. Eftir eina slíka uppliving gongur tú jú støðugt og hugsar, hvat tað er, sum gongur fyri seg í høvdunum hjá slíkum fólki. Samstundis royni eg at vera sterkur, soleiðis at familjan í Brasil heldur alt standa væl til. Eg vil jú ikki hava, at tey skulu kenna seg ótrygg, og tí latið eg altíð væl at, tá eg tosi við tey. Men í løtum kann tað vera serstakliga hart, sigur hann.

### Viðurkennið trupulleikan

Spurdur, um hann hevur nakra loysn upp á trupulleikan, sigur Alex, at sjálvandi er einki gandaorð, sum uttan víðari kann loysa hetta.

- Men í mínum hugaheimi er hetta ein trupulleiki fyri føroyskan fótbólt. Og tað er ein trupulleiki, sum fótbólturin eisini má viðurkenna. Tað er ein uppgáva, sum FSF, fótbóltsfeløgini sjálvi og ikki minst dómararnir mugu viðurkenna. Og royna at gera nakað við. Sjálvandi kann ein dómari ikki fáa alt við, men allir dystir verða í dag tiknir upp á sjónbandi. Og eins væl og hendingar av øðrum slag kunnu revsast, átti hetta eisini at verið nakað, sum ansað verður eftir, sigur Alex.

# Vit eiga øll ábyrgdina

**Jákup í Stórustovu, spælaraumboðsmaður, sigur seg kenna trupulleikan við rasismu aftur. Og hann slær fast, at hetta er nakað, sum ikki bert rakar fremmandar fótbóltsspælarar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jákup í Stórustovu hevur nógv samband við nógvu av fremmandu spælarunum í Føroyum, og hann kennir væl trupulleikan, sum Santos nevnir, aftur.

- Tað er ein trupulleiki, sum eg kenni aftur. Rasisma finst í fleiri førum, men serstakliga er tað húðarliturin, sum oftani verður nýttur. Og hetta er ein trupulleiki. Hvørki á vøllinum ella í samfelagnum sum heild er hetta nakað, sum kann góðtakast, og tí mugu vit gera nakað við hendan trupulleikan.

- Men tað eru ikki bara útlendskir spælarar, sum eru offur fyri hesum. Vit hava fleiri dømi úr yngru deildunum við sama trupulleika. Tað er jú púra vanligt, at ættleidd børn eru partar av liðnum, og har eru dømi um, at bæði spælarar, venjarar og foreldur koma við slíkum rópum.

- Og her hava vit øll eina ábyrgd. Foreldur og spælarar í fremstu deildunum hava eina stóra ábyrgd í so máta. Talan er um fyrimyndir fyri ungar spælarar, og tí eiga vit øll eina stóra ábyrgd í at loysa trupulleikan, sigur Jákup í Stórustovu.

## Til viðgerðar beinanveg

Í morgin hava formenninir í føroysku fótbóltsfeløgunum fund. Hesin snýr seg ikki serstakt um trupulleikan, sum verður nevndur á hesum síðum, men FSF-forsetin, Óli Holm, er ikki í iva, tá vit tosa við.

- Um tað er so, at rasisma er við at vinna seg fram í føroyskum fótbólti, so eigur tað at steðgast alt fyri eitt. Tað er eitt fyribrigdi, sum avgjørt ikki hoyrir heima innan ítróttin – og heldur ikki aðrastaðni – og eitt nú hava bæði FIFA og UEFA gjørt nógv fyri at steðga hesum.

- Satt at siga, so havi eg ikki hildið, at trupulleikin hevur verið somikið stórur her hjá okkum. Sjálvandi hava vit hoyrt um einstøk dømi, men er talan um ein generellan trupulleiki, skal hetta steðgast alt fyri eitt!

Men dugir tú ítøklilga at siga, hvørji stig eiga at verða tikin?

- Fyrst og fremst, so er tað nakað, sum ljós má varpast á. Við at gera tað, kunnu vit siga bæði spælarum, leiðarum og áskoðarum, at hetta verður ikki góðtikið. Og at fáa tann boðskapin út, má vera fremsta málið. So eru sjálvandi fleiri hættir, sum hetta kann gerast uppá. Í so máta er fundurin í morgin eitt gott høvi, og hetta er eitt mál, sum skal takast upp alt fyri eitt, sigur Óli Holm.

**-mørk**

## Ikki nakað við rasismu at gera

Tveir av spælarunum, sum Alex José Dos Santos sigur seg vera háðaðan av mikukvøldið, vóru brøðurnir, Ronnie og Hans Pauli Samuelsen.

Tá vit tosa við teir báðar, siga teir, at teir ikki á nakran hátt vilja skírast sum rasistar.

- Tað, sum hendir í júst hasum førinum, er, at hann tekur ein mann hjá okkum. Og tí farið eg eftir honum. Tað hevði eg gjørt, líka mikið hvør mótstøðumaðurin var, sigur Ronnie.

Eftir dystin skeldaðust teir báðir spælararnir eina góða løtu, men Ronnie slær fast, at heldur ikki hetta hevði nakað við húðarlit at gera, sigur Ronnie.

- Eg kenni sum sagt ikki nakað til handan trupulleikan. Sjálvandi verður nógv sagt á einum vølli, sum ikki verður sagt í vanligari talu. Og eg skal avgjørt ikki gera meg betri enn onnur. Men eg vil afturvísa, at eg í so máta havi verið atvoldin til beinleiðis rasismu á vøllinum, sigur hann.

Og yngri beiggin, Hans Pauli, er sum so ikki ósamdur.

- Rasisma er sjálvandi nakað, sum eg harðliga vil taka frástøðu frá. Eg veit væl, at nógv verður sagt á vøllinum, og sjálvur fái eg eisini mítt oman yvir meg. Men tá dysturin er av, er hetta liðugt. Og sum sagt, so taki eg persónliga kraftiga frástøðu frá rasismu, sigur Hans Pauli.

**-mørk**

## Kann ikki góðtakast

Egil á Bø, sum er liðskipari hjá EB/Streymi, sigur seg ikki kenna nakað til, at viðmerkingar millum spælarar hava verið serliga óndsinnaðar á Eiði.

- Men tað er klárt, at er hetta ein trupulleiki, so kann tað á ongan hátt forsvarast. Rasisma er nakað, sum ikki hoyrir heima á einum vølli. Sjálvandi vilja tað altíð vera støður, har spælarar ilskast á hvønn annan. Men er hetta so, so má hetta henda út frá hendingum á vøllinum. Og ikki tí ein persónur hevur ávísan uppruna ella húðarlit.

- Og er tað ein trupulleiki, so eigur fokus at verða sett á hann. Tað er í øllum førum ein av mátunum, sum kann vera við til at loysa ein slíkan trupulleika, heldur Egil.

**-mørk**